# Kjak



Óli Mikkelsen
*lækni*

## Sjúkrahúsverkið givið upp fyri skutil

Sum vant las eg ólavsøkurøðuna hjá løgmanni og leitaði eftir visjónum um heilsuverkið og serliga sjúkrahúsverkið, har eg hevði mítt starv.

Tað sum minti um visjónir var, at nú skuldu tey trý sjúkrahúsini samskipast, men hvussu hetta skuldi gerast, stóð einki um.

Eg hevði varhugan av, at sjúkrahúsverkið var givið upp fyri skutil.

Stutt eftir ólavsøku kemur borgarstjórin í Klaksvík við eini grein, har hon roynir at verja Klaksvíkar Sjúkrahús, og tað skilji eg væl, - men hví hundan skal greinin vera gjøgnumsúrgað av ábreiðslum móti Landssjúkrahúsinum.

Nakað seinni kemur ein ávísur politikari úr Klaksvík við ábreiðslum móti Landssjúkrahúsinum, - ábreiðslurnar eru afturvístar sum ógrundaðar.

Sum eitt snarljós koma boðini, at sjúkrahússtjórin á Landssjúkrahúsinum er sagdur úr starvi. Einki skil á grundgevingunum fyri uppsøgnini.

Næstan samstundis kemur yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi við drúgvari grein - heilar tvær blaðsíður - hvar Klaksvíkar Sjúkrahús verður hálovað, og aftur her verður klikt niður á Landssjúkrahúsið.

Heilsumálaráðharrin er undir stórum trýsti frá sínum veljarum í Klaksvík og tykist ikki at klára trýstið. Ógrundaða uppsøgnin av dugnaligum sjúkrahússtjóra á Landssjúkrahúsinum er ein skarnsgerð, sum kann skaða sjúkrahúsið í langa tíð, um ikki aðrar kreftir leggja uppí og bøta um skaðan. Sjúkrahúsverkið hevur ov stóran týdning í samfelagnum til at vera slept upp á fjall, so tann skutlar til sín, sum frekastur er.

Vónandi kunnu mistøk gera, at vit fáa ein heilsupolitikk, sum skil er í.

Jórun Syderbø

## Landssjúkrahús/ Røktarheim

Eftir at hava virkað sum sjúkrasystir í 24 ár, loyvi eg mær at átala umstøðurnar hjá røktarsjúklingum á Landssjúkrahúsinum LS, sum bara versna dag frá degi.

Okkara elstu og veikastu borgarar hava eina vanvirðiliga tilveru á Landssjúkrahúsinum.

Teirra einasta privata er ein song og eitt náttborð.

Tey verða flutt aftur og fram millum stovu/gongd (eisini á miðjari nátt). So vit fáa pláss at viðgera akuttar sjúklingar.

Hetta er fólkið, sum hevur lagt lunnar undir okkara samfelag. Mong fáa ikki tosað fyri seg, og teirra avvarðandi mugu á knøini, fyri at fáa teimum bara eitt stað at vera.

Tað tykist sum okkara politikarar ikki skilja, at eitt sjúkrahús er eitt sjúkrahús, og eitt røktarheim er eitt røktarheim. Tí er yvirbelegningur av røktarsjúklingum, so skuldi tað sæst á røktarheiminum (við t.d. 2-songsstovum sum fyribilsloysn).

Sum støðan er, so syndrast LS, og allar miðvísar strategiðir/ætlanir detta á gólvið. Starvsfólk eru strong, tí hetta er ikki gott nokk.

Tað sigst at eitt samfelag kann metast eftir, hvussu tey veikastu hava tað. Støðan hjá teim veikastu er skammilig fyri okkara samfelag.



Jákup Petersen
*yvirlækni*

## Nei, Landssjúkrahúsið er ikki eitt lasarett

*Skelkandi at lesa bløðini herfyri, har róð var fram undir, at Landssjúkrahúsið er vorðið eitt lasarett sum skal verða ótryggt at koma inn á*

Í heila tikið hava bløðini seinastu tíðina verið á tremur við rapportering av, hvussu illa stendur til á Landssjúkrahúsinum. Ikki eitt orð um Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús, sum í hesum døgum noyðast at gera mest kollveltandi broytingar í virkseminum nakrantíð fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Deildarleiðari á Landssjúkrahúsinum tekur nú blaðið frá munninum og sigur, at Landssjúkrahúsið nú er vorið eitt lasarett við ríkiligum møguleikum fyri feilkanning og viðgerð. Eitt ótryggt sjúkrahús at koma inn á.

Eg havi í øllum førum ongan illgruna um, at Landssjúkrahúsið nú er vorðið eitt ótryggari stað at koma inn á enn hini bæði sjúkrahúsini.

Í heila tikið eru ongi tekin til, at trupulleikin á Landssjúkrahúsinum er millum fakfólkið. Øll vita jú, at tað snýr seg um ein leiðslutrupulleika.

Nú Heilsumálaráðið hevur yvirtikið leiðsluna, so restar bert í, at øll leiðslan verður koyrd til hús. At fáa ein nýggja sjúkrahússtjóra loysir ongar trupulleikar, hann kemur bert í klemmu í somu leiðslukarrusel og fer sum frá líður at leggja kongin, verða fluttur upp til Heilsumálaráðið ella fáa sekkin. Fer ikki øll leiðslan, frá verður turpulleikin ikki loystur.

Harafturat er tað sera umráðandi, at tað ikki koma fakfólk í leiðsluna. Fakfólkini liggja sum oftast í sjálvdrátti meðan førleiki og heildarmyndin kemur í aðru rekkju.

Ført verður fram, at dýrari medisin skal verða orsøkin. Tað er jú bert møsn. Dýrari medisin hevur so vítt eg minnist verið nevnt sum orsøk við so at siga hvørjari einastu eykajáttanarumsókn frá Landssjúkrahúsinum seinastu 10 árini. Ein kompetent leiðsla hevði sjálvandi loyst henda spurning fyri nøgvum árum síðani.

Eg haldi, at tíðin er komin fyri Landssjúkrahúsi, at taka ábyrgd og standa fram sum landssjúkrahús.

Øktu játtanirnar til Landssjúkrahúsið seinastu 10 árini hava kostað skattaborgaranum umleið 700 mió kr. Vit tosa her um eina øking av játtanini uppá 75% yvir 10 ár. Helst eindømi í okkara parti av himinum.

Íløgurnar til Landssjúkrahúsið seinastu 10 árini eru umleið 350 mió kr, og eykajáttanir eru eini 70 – 80 mió kr. Alt sum alt hevur Landssjúkrahúsið kostað føroyingum 1,1 milliard eyka í íløgum, øktum játtanum og eykajáttanum seinastu 10 árini.

Eg vildi meint, at stundin er komin til at seta krøv. Borgarnir uttan fyri Tórshavnar Kommunu hava sostatt seinastu 10 árini goldið 650 mió. kr. eyka fyri, at Landssjúkrahúsið skal fungera sum eitt landssjúkrahús.

Ella við øðrum orðum, so hevur hvørt einasta húskið í Norðuroyggjum, Eysturoy, Norðurstreym, Vágoy, Sandoy og Suðuroy goldið 9.000 kr. árliga eyka seinastu 10 árini fyri, at Landssjúkrahúsið skal verða landssjúkrahús.

Verður samlaði árligi kostnaðurin fyri at hava Landssjúkrahúsið gangandi er hjá somu húsum árligi kostnaðurin kr. 30.000. Tað vil siga at eitt húski á Tvøroyri skal gjalda umleið kr. 2.500 um mánaðin fyri, at Landssjúkrahúsið skal kunna virka. Borgararnir á Tvøroyri lata yvir 1 mió um mánaðin, so at landssjúkrahúsið skal virka sum eitt landssjúkrahús.

Hetta er ikki ein lokal kommunalur spurningur. Tvøroyrar kommuna hevur líka stóran rætt til at seta krøv sum Tórshavnar kommuna. Borgarnir í Klaksvíkar Kommunu gjalda eftir hesi útrokning gott og væl 3 mió kr. um mánaðin fyri tænastuna á Landssjúkrahúsinum. Og hvørj krøv setur so Klaksvíkar Kommuna?

Nú landsstýrismaðurin ikki hevði annan møguleika enn at koyra Allan Skaalum til hús, noyðist eg at nevna, at Allan helst hevur verið besti sjúkrahússtjóri Landssjúkrahúsið nakrantíð hevur havt. Hann var eisini væl umtóktur á hinum báðum sjúkrahúsunum. Ein reiðiligur maður, sum ein kundi líta. So tað var spell.

Eftir er so at koyra restina av leiðsluni frá so skil, álit og samstarv aftur kann koma í hásæti.